NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Føðingar

23. oktober fingu Lisa Mikkelsen & Jónsvein Petersen, Tórshavn eina dóttur. Hon vigaði 4220 gr og 54 cm long.

9. november fingu Elin Michelsen úr Tórshavn og Símun Eliasen úr Fuglafirði eina gentu. Hon vigaði 3850 gram og var 54 cm lang.

18. oktober fingu Jórun H. J. Djurhuus og Anders Vedelsbøl, Keypmannahavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 5010 gr.

28. oktober fingu Elsa og Sverri Michalsen, Norðdepli, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4300 gr.

29. oktober fingu Vibeke og Aksel Joensen, Nólsoy, ein son. Hann var 57 cm.langur og vigaði 4700 gr.

5. november fingu Jutta í Horni Hansen og Ólavur Niels Debes eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3400 gr.

7. november fingu Birita D. Hansen og Martin Karl Olsen, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3725 gr.

7. november fingu Durita Djurhuus og Bogi Nielsen, Fuglafirði, eina dóttur. Hon var 57 cm long og vigaði 4300 gr.

8. november fingu Gunrid og Leivur Torvadal, Hoyvík, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3900 gr.

8. november fingu Ann og Torbjørn Durhuus, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3500 gr.

8. november fingu Elin Johnsdóttir, Tórshavn, og Oyvildur Haldansen, Vestmanna, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4100 gr.

8. november fingu Sólgerð Henriksen, Sandavági, og Hans Bogi Ellefsen, Miðvági, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4110 gr.

8. november fingu Anna Maria Larsen og Carsten Zimakoff, Syðrugøtu, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4350 gr.

9. november fingu Anna og Róðin Mellemgaard, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3750 gr.

9. november fingu Jenni og Jákup Eli Thomsen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3400 gr.

10. november fingu Annika Egholm og Hans Hjalti Skaale, Klaksvík, ein son. Hann var 49 cm langur og vigaði 2200 gr.

10. november fingu Jütta og Jógvan Reynslág, Argjum, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3850 gr.

Malena Purkhús 80 ár

Mánadagin 15. november rundar Malena Purkhús úr Klaksvík tey áttati.

Malena var borin í heim tann 15. november í 1924 á Syðradali á Kalsoynni. Foreldur hennara vóru Sigvald Jacobsen av Syðradali og Jóhanna Rasmussen av Kirkju á Fugloynni.

Malena og familja hennara flutti til Klaksvíkar, tá hon var knapt tvey ára gomul. Hon er elst av seks systkjum, tríggir beiggjar og tríggjar systrar.

Í 1950 giftist Malena við Juliusi Purkhús úr Kunoy. Tey fingu seks børn, fýra dreingir og tvær gentur, sum øll búgva í Klaksvík. Julius andaðist í 1984, og hevur Malena sostatt verið einkja í 20 ár.

Meðan børnini vóru smá, gekk Malena heima og passaði tey. Tá hon fór út at arbeiða byrjaði hon sum skrivstovukvinna í Klaksvík. Tá so tveir av synunum fóru upp í alivinnuna og stovnaðu fyritøkuna Faroe Salmon tók hon sær av øllum bókhaldinum tí viðvíkjandi. Og tað ger Malena enn tann dag í dag á kontórinum heima hjá sær sjálvum.

Mammu verður ynskt hjartaliga til lukku við runda degnum.

Børnini

Ib Hjersing Skovbo, herflotaserfrøðingur:

25 ára starvsdag hjá Sjóverjuni



Færøernes Kommando frá 1981-82. Síðan sigldi hann í eitt ár við korvettini "Olfert Fischer".

Sunnudagin 14. november 2004 hevur Ib Hjersing Skovbo, herflotaserfrøðingur, 25 ára starvsdag hjá Sjóverjuni, harav níggju ár í Føroyum.

Ib Hjersing Skovbo byrjaði í 1979 á Søværnest Eksercerskole sum lærlingur innan danska herin. Tá byrjaði fyrsti parturin av útbúgvingini. Hann sigldi við minuútleggjaranum "Fyen" í tríggjar mánaðir. Síðan á skúlabonk har tann fakligu grundútbúgvingin sum elektromekanikari gekk fyri seg.

Eftir tað kom hann til Føroya at gera tænastu hjá Færøernes Kommando

Hann gjørdi aftur tænastu hjá Færøernes Kommando frá 1983-89, sum endaði við at hann fekk sveinabræv sum elektromekanikari.

Nú var tíð til nýggjar avbjóðingar, og Ib flutti til Randers, har hann í eitt hálvt ár tók útbúgving sum elektronikteknikari. Eftir tað fór hann aftur í tænastu hjá Sjóverjuni, hesaferð hjá Kattegats Marinedistrikt í Frederikshavn.

Tá Marinestationen Anholt varð løgd undir Kattegats Marinedistrikt, kom Ib at gera tænastu á Anholt til 1999, tá hann aftur kom til Kattegats Marinedistrikt.

Síðan 2001 hevur Ib búð í Føroyum, har hann hevur gjørt tænastu í "kommunikationsdriftelementet" hjá Færøernes Kommando.

Ib býr í Havn og eigur saman við føroysku konu síni Anny, sum hann hevur verið giftur við seinastu 10 árini, fýra børn: Kenneth, 22 ár, Annika 18 ár, Nicolaj 11 ár og Trine 3 ár.

Ib kann ikki fjala, at honum hevur dámt sera væl hjá Sjóverjuni - sum hann sjálvur plagar at siga,"Jeg er her jo stadig".

Minningarorð um floksfelaga okra

Leon Gunnar Johannesen

14.11.88 22.3.04

Best sum sólin fagrast skínur,
deyðin inn um dyrnar trínur

Skelkurin var stórur, tá ið boðini komu um, at tú ikki vart í millum okum longur.

Í morgin 14-11-04 hevði tú fylt 16 ár, men nú er ongin at halda føðingardagin fyri.

Tað er stórur saknur í flokkinum, nú tú ikki er her. Ongin kann taka títt pláss í okra hjørtum - ei heldur í tí, sum okur gera.

Í níggju ár hava okur verið saman báði í skúlanum og í okra frítíð. Okur hava verið gjøgnum nógv og hava upplivað nógv saman. Hendingar, sum okur ongantíð gloyma.

Tú vart ein av teimum stillu typunum, og ongan-tíð vart tú í ringum lag og altíð klárur at hjálpa, og so fekst tú onnur at smílast, tá ið tey høvdu niður-túrar.

T.d. í fríkorterinum, so vart tú ongantíð einsamallur, tað var altíð onkur hjá tær. Tú vart altíð mittpunktið, har tú var.

Títt smíl smittaði onnur, og tað bar ikki til at vera í ringum lag, tá man var saman við tær.

Heima hjá tær samlaðust vinirnir ofta, tí tað var altíð líka gott og heimligt hjá tykum.

Ofta sótu okur á Statoil um kvøldarnar, og tú kom koyrandi á tíni motorcross. Okur høvdu nógvar góðar løtur saman, ógloymandi løtur.

Saknurin er so stórur, at tað er ringt at skriva tað í orðum. Tað er eisini ringt at missa ein vin í teenageárunum, tí tað er tá, tú hevur mest brúk fyri teimum.

Okur takka Irdi, Teddy og Angeli fyri ta góðu tíðina, okur høvdu saman og fyri tykra blíðskap. Okra tankar eru hjá tykum og tykra familju.

Friður verið við minninum um floksfelaga okra Leon Gunnar.

Floksfelagarnir

NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Handilsvirkið Nicalsen, Sørvágur:

Handlað í 140 ár

Í ár eru 140 ár liðin síðan familjan Niclasen byrjaði at handla í Sørvági. Í 1956 var einahandilin avtikin og tá fingu føroyingar sjálvir loyvi at hava handil. Fyritøkan byrjaði sum ein úthandil hjá Mortensen á Tvøroyri

TÍÐINDASKRIV

Í 1964 byrjaði so Norðstovuhandilin í Sørvági og í dag er tað 6. ættalið Jørgen Niclasen, sum roynir at dríva handil.

Í dag eru tríggjar deildir: ein timburdeild, ein byggi/búnýtis & málingadeild og ein beinsinstøð. Í samband við 140 árini, hava allar deildinar nógv góð tilboð vikuskifti 12 - 13. november. Fríggjadagin verður opið til kl. 19.00 og leygardagin til kl. 17.00.

Andlát

4. november
Palma Djurhuus, Skálavík, 87 ár.

5. november
Turid Viderø á Viðareiði, 85 ár.

6. november
Anna Sofía Hansen, vanliga nevnd Fía, ættað úr Saksun, 98 ár.
Malmberg Simonsen úr Sørvági, 84 ár.

8. november
Dagny Højgard, Toftir, 84 ár.
Daniella Strøm, ættað úr Hvalba, búsitandi í Helsingør, 92 ár.

Pól Skarðenni í Smiðjuni

Fríggjadagin 12. november læt Pól Skarðenni, listamaður í Vatnsoyrum, upp eina málningaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík.

Á framsýningini eru millum 35 og 40 málningar. Myndaevnini eru t.d. bygdir og landsløg í Føroyum.

Framsýningin er opin til og við týsdagin 16. november allar dagar frá kl. 15-18.

Fríggjadagin 12. november læt Pól Skarðenni, listamaður í Vatnsoyrum, upp eina málningaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík
Mynd: Jens Kristian Vang

Tøkk

Hjartaliga takki eg tykkum øllum, sum gleddu meg á 75 ára føðingardegnum 4. okt.

Heilsan Gudrun Joensen

70 ár føðingardagur

Sunnudagin 14. november fyllir Andras Skarðenni, Klaksvík, 70 ár. Føðingardagin er Andras burturstaddur.

Prógv

12. november tók Hilda Kjølbro, Viðareiði, prógv sum køksassistentur á Hotel- og Restaurantskolen í Keypmannahavn

Katja Øssursdóttir Nielsen, Svendborg, hevur 11. nov. 2004 lokið prógv sum pedagokur á Lærda Háskúlanum í Odense.

Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri alla hjálp og sýnda samkenslu, tá ið góði pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

Jóhan Marius Johannesen
Norðskála

doyði og varð jarðaður.

Tøkk fyri blómur og kransar, og tøkk til øll, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

Fyri tey avvarðandi
Edla og Terji

Niels Petur Nolsøe, Vágur:

NePtuN við yrkingasavninum Smátúgvur

Leygardagin 13. november frá kl. 16.30-18.30 signerar Niels Petur Nolsøe nýggja yrkingasavnið Smátúgvur, sum hann gevur út á egnum forlagi, í Stóra Pakkhúsi í Vági.

Smátúgvur er 171 blaðsíður við yrkingum, tættum, fosturlandssangum, og sálmum, sum Niels Petur sjálvur hevur yrkt.

Hann er best kendur undir dulnevninum NePtuN, sum hevur gjørt hópin av tættum til V4 sendingarnar hjá Útvarpi Føroya.

Niels Petur Nolsøe er 59 ára gamal og vágbingur. Hann hevur verið fólkaskúlalærari í Vági síðan 1969.

Hann tók læraraprógv á Føroya Læraraskúla í 1969. Tað var, meðan hann gekk á læraraskúla í Havn, at hann byrjaði at yrkja í smáum til veitslur o.l.

Tá hann so kom suður aftur til Vágs, gjørdi hann ymiskar tættir til t.d. nýggjárshaldini í Vági og til onnur tiltøk.

Nú er so ein partur av tí, sum hann hevur yrkt seinastu umleið 40 árini, savnað í yrkingasavninum Smátúgvur.

Ætlanin er eisini at hava eina kvøldsetu í Vági leygarkvøldið 20. november.



Leygardagin 13. november frá kl. 16.30-18.30 signerar Niels Petur Nolsøe nýggja yrkingasavnið Smátúgvur, sum hann gevur út á egnum forlagi, í Stóra Pakkhúsi í Vági
Mynd: Magnus Gunnarsson

Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá okkara elskaða mamma, vermamma, omma og langomma

Andrea Weihe
vanliga nevnd Diddi
Selatrað

andaðist og varð jarðað.

Tøkk fyri kransar, blómur og uppringingar.
Ein serstøk tøkk til tykkum heimahjálparar, sum vóru so góðar við hana.
Tøkk til tykkum, sum hjálptu til og fylgdu henni, bæði úr kapellinum og úr heiminum, til hennara seinasta hvíldarstað.

Fyri tey avvarðandi
Børnini